








# JÓLACRUISE TIL EDINBURGH

Komið við Norrönu á ársins jólacruise til Edinburgh 3.-6. desember. Gerið kvettið – í Edinburgh er úrvalið stórt – og prísirnir lágir. Smyril Line syrgir fyri, at tit verða koyrd fram og aftur frá miðbýnum. Vit liggja við bryggju tætt við miðbýin og verða liggjandi har í meira enn eitt heilt samdøgur. Hetta gevur øllum góða tíð til at finna alt tað besta, sum Edinburgh hevur at bjóða.

Umborð á Norrönu hava vit hópin av góðum jólatilboðum. Eisini er góður jólamatur, undirhald og dansur hvørt kvøld. Í ár hava vit fingið Hilmar Jan Hansen, Jens Marni Hansen Band, Stanley Samuelsen og onnur til at undirhalda og geva tykkum eina ógloymandi ferð til Edinburgh við Norrönu.

Men skundi tykkum – tí tey fyrstu fáa tey bestu plássini!

## FYRI HVØNN FRAM OG AFTUR ÚR BERT KR. 695,-

Íroknað kostnaðinum er ferðin fram og aftur við Norrönu. **Ferðaseðin skal gjaldast við bílegging.** Børn undir 12 ár, sum sova í somu koyggju sum foreldrini, sleppa ókeypis við. Børn yvir 12 ár skulu hava eina koyggju. Prísurin er ikki galdandi fyri svitu og luksuskømur. Bilurin kann takast við fyri kr. 500,-, men kann ikki takast við í land. Øll avgjøld eru íroknað kostnaðinum. Tilboðið er treytað av at pláss er umborð á Norrönu á nevnda túri.

SMYRIL LINE · J. BRONCKSGØTA 37 · POSTSMOGA 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL +298 34 59 00 · FAX +298 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO

DANMARK · NOREG
ÍSLAND · SKOTLAND
CRUISE

WWW.SMYRIL-LINE.FO





# YVIRSTÝRIMAÐUR TIL NORRÖNU

## Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Pf Smyril Line søkir eftir yvir stýrimanni til Norrönu. Vit bjóða tær eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Pf Smyril Line.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu ferðamannaskipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis største skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferðafólk, 800 bilar og manningin, tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

Smyril Line leggur stóran dent á at hava so gott starvsfólkatilfeingi sum gjørligt og at skapa so góðar karrierumøguleikar sum gjørligt. Tískil er tað ein treyt, at umsøkjarin hevur skipsstjórapotentiali og kann virka sum avloysaraskipari á Norrönu.

**Førleikakrøv:**

- Vinnubræv sum skipsførari á 1. stig.
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvs- og leiðaraevni.
- Øll kravd og neyðug skeið og prógv.
- Leiðsluroyndir umframt góð búskaparlig og analytisk evni.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir frá ferðamannaskip um áður, men hetta er eingin treyt.

**Lønarviðurskifti og setanartreytir**
Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Skipara- og Navigatørfelagið og Reiðarafelagið. Umframt sáttmálalønina verður serligt ískoyti latið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**PF SMYRIL LINE**
Att. Andras Róin, stjóri
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn
ar@smyril-line.fo

Umsøknir skulu verða okkum í hendi **í seinasta lagi 9. november 2007.**

Nærri kunning um starvið kunnu fáast við at venda sær til Andras Róin, stjóra, á tlf. 345900.

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyar, Ísland, Noreg, Danmark og Týsklandi, umframt samstarvsfelagar í nógvum øðrum londum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM